

## Tróndur Patursson á Rás2 um sítt lívsverk

1. mars fylti ein av okkara mætastu listamonnum gjøgnum allar tíðir, Tróndur Pætursson, 65 ár. Tróndur, sum hevur verið ein av okkara virknastu og kendastu listamonnum, er framvegis sera virkin, og hann hevur ongar ætlanir um at leggja árarnar inn. Tvørturímóti hevur hann nógvar uppgávur í løtuni, og stendur tað til hansara og heilsan loyvir tí, so hann hevur eisini eitt dreymaynski um sítt lívslistaverk, sum enn ikki er gjørt. Alt hetta sigur hann frá á sín menniskjanliga, livandi og serstaka hátt í morgunsendingini á Rás2 mánadagin frá klokkan 10. Jan Müller hittir fólkakæra listamannin umborð á flaggskipi okkara, Norrønu nú um dagarnar.



# Nevndin í Atlantsflogi tók ta røttu avgerðina

**Nevndin í Atlantic Airways gjørdi einki skeivt, tá hon gjørdi av at keypa partabrøv frá fýra leiðandi persónum í felagnum. Tvørturímóti var avgerðin bæði røtt løgfrøðiliga og tann, sum undir táverandi umstøðum tænti felagnum best**

PARTABRÆVAHANDIL
*Jan Múller/Árni Joensen*
*jan@sosialurin.fo*
*arni@sosialurin.fo*

**Rás2/Sosialurin:** Tað hevur tikið hart á kíkin hjá nevndini í Atlantic Airways, síðani hon fyri nýggju mánaðum síðani samtykti at keypa partabrøv frá stjóranum og trimum øðrum leiðandi persónum í flogfelagnum. Fjølmiðlar og onnur løgdu nevndina undir at hava givið teimum fýra seljarunum fyrimun fram um aðrar partaeigarar. Tað hildu einstakir útlendskir serfrøðingar eisini, og onkur politikari vildi hava nevndina frá á næsta aðalfundi.

Men nevndin gjørdi einki skeivt. Tvørturímóti. Avgerðin, sum hon tók seinasta summar, var í fínasta lagi løgfrøðiliga, og oman á tað var hon handilsliga tann besta fyri Atlantic Airways undir táverandi umstøðum. Harafturat var avgerðin heldur ikki brot á regluna um, at allir partaeigarar skulu hava somu viðferð.

So greiður er boðskapurin frá tí kenda danska løgfrøðiprofessaranum Erik Werlauff, sum eftir áheitan frá nevndini í Atlantic Airways hevur kannað partabrævahandilin og latið nevndini sína meting av málinum. Erik Werlauff er ikki hvør sum helst, men verður roknaður sum ein tann fremsti løgfrøðingurin innan partafelags- og børsrætt í Danmark. Tað er tí einki at siga til, at nevndarformaðurin í Atlantic Airways er fegin um niðurstøðuna hjá tí kenda starvsbróðurinum.

### Nevndin reinsað

Sambært formanninum var tað umráðandi hjá nevndini at fáa ein óheftan og virdan løgfrøðing at kanna málið, tí tann umrøða, sum málið hevur fingið í fjølmiðlunum, hevur ikki verið rættvís, sigur Christian Andreasen. Nevndin sjálv var ongantíð í iva um, at avgerðin var í lagi, og tað fekk hon eisini at vita frá bæði innanhýsis og uttanhýsis løgfrøðingum, sum vórðu bidnir um at siga sína hugsan um málið.

-Sjálvandi vistu vit, at vit máttu tryggja okkum, at alt var løgfrøðiliga í lagi, og tí fingu vit eisini fulla vissu fyri, sigur formaðurin. At útlendskir serfrøðingar høvdu eina aðra uppfatan av málinum komst sambært formanninum av, at teir kendu ikki málið nóg væl. Erik Werlauff hevur harafturímóti havt atgongd til allar upplýsingar í málinum og hevur eisini fingið svar upp á fleiri spurningar, sum hann hevur sett nevndini. Tí kennir Christian Andreasen seg sannførdan um, at niðurstøðan hjá danska professaranum er tann løgfrøðiliga rætta.

-Kennir nevndin seg reinsaða nú?
-Í hesari frágreiðingini stendur, at nevndin er fullkomiliga fríkend fyri øllum ákærum, og harafturat metir hann, at nevndin tók eina handilsliga klóka avgerð. Ein má hava í hugsa, at umstøðurnar vóru serligar, tá nevndin tók avgerðina í juni í fjør, og í nevndini var semja um, at avgerðin, sum vit tóku, var tann, sum var best fyri felagið, og tað var tað, sum var avgerandi fyri nevndina, sigur Christian Andreasen.

### Skeivt við politiskari viðgerð

Millum teir politikararnar, sum funnuast at avgerðini hjá nevndini í Atlantic Airways seinasta summar var tingmaðurin Jóhan Dahl, sum beinleiðis segði, at landsstýrið átti at koyra nevndina frá alt fyri eitt. Í dag er Johan Dahl landsstýrismaður í vinnumálum og hevur tískil millum annað flogferðslu sum málsøki.

Christian Andreasen sigur, at tað er skeivt av tí politiska myndugleikanum at úttala seg um eitt børsskrásett felag, sum er partvíst einskilt. Tá landsstýrið einskilti felagið, bant tað seg til einans at taka handilslig atlit til felagið, og landsstýrið bant seg til ikki at viðgera felagið út frá einum politiskum vinkli.

-Hevur landsstýrið gjørt tað?
-Tá ein landsstýrismaður fer út og sigur, at nevnd og leiðsla skulu fara frá her og nú, so er tað brotá ta skyldu, sum landsstýrið hevur átikið sær við at børsskráseta felagið, sigur Christian Andreasen.

-So eftir tínum tykki eigur nevndin at verða sitandi?

-Tað er upptil partaeigararnar at taka støðu til. Men tað skal gerast út frá einum handilsligum sjónarhorni og ikki einum politiskum, sigur Christian Andreasen, sum leggur afturat, at hann hevur ikki fingið nakra ábending um, at hann skal frá á aðalfundinum 2. apríl.

### Ógreið politisk signal

Christian Andreasen heldur, at tann politiska handfaringin av Atlantic Airways hevur ikki verið serliga heppin. Tá ein triðingur av felagnum bleiv einskildur í 2007, varð sagt, at landsstýrið bant seg til at arbeiða fram ímóti at einskilja ein triðing afturat. Seinni hevur landsstýrið so sagt, at tað verður ikki gjørt kortini.

-Heldur tú, at teir privatu partaeigararnir hava sett pening í felagið undir skeivum fyritreytum?
-Tað fari eg ikki at taka støðu til. Sjálvandi veit eg, at nógv er hent síðani. Men eg vil siga, at tey politisku signalini, sum eru komin frá landsstýrinum síðani einskiljingina hava verið ógvuliga ógreið. Í mínum eygum hava teir privatu partaeigararnir krav upp á eina rættiliga greiða útmelding um, hvat landsstýrið ætlar á økinum, sigur Christian Andreasen.

## Johan Dahl stendur við sítt

**Málið varð handfarið fyri mína tíð, so tað er ikki mítt mál, men eg standi fast við tað, sum eg segði í fjør um partabrævahandilin, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum**

PARTABRÆVHANDIL
*Jan Múller/Árni Joensen*
*jan@sosialurin.fo*
*arni@sosialurin.fo*

**Rás2/Sosialurin:** Millum teir politikararnar, sum funnust at avgerðini hjá nevndini í Atlantic Airways at keypa partabrøv frá leiðsluni í felagnum, var sambandstingmaðurin Johan Dahl, sum beinleiðis vildi hava landsstýrið at koyra nevndina frá. Í dag er Johan Dahl landsstýrismaður í vinnumálum og umsitur harvið millum annað júst Atlantic Airways.

Johan Dahl ásannar, at Erik Werlauff hevur eina aðra niðurstøðu, enn hann sjálvur hevur havt til partabrævamálið. Men hetta málið er farið, sigur hann og vísir á, at tað var handfarið í vinnumálaráðnum og av undanfarna vinnumálaráðharra.

-Tískil var málið avgreitt fyri mína tíð sum landsstýrismaður í vinnumálum og er tí ikki mítt mál, sigur Johan Dahl.

Men tað merkir ikki, at Johan Dahl hevur skift støðu í málinum, og hann stendur framvegis við tað, sum hann segði í fjør út frá teimum upplýsingum, sum hann hevði um málið tá.

-Ja, eg haldi, at tað, at ein leiðsla í einum felagi kundi seta nevndina í eina slíka støðu, sum har bleiv gjørt, var eftir mínum tykki ikki moralskt forsvarligt, og við teimum upplýsingum, sum fyrilógu, so standi eg framvegis við tað, sum eg segði tá.

Johan Dahl vil ikki siga, um Atlantic Airways fær nýggja nevnd á aðalfundinum 2. apríl. Hann vil heldur ikki siga, um frágreiðingin frá Erik Werlauff fær nakra ávirkan á hansara støðutakan til nevndarvalið.

-Tað eru nøkur handilslig sjónarmið, sum skulu takast, tá ein skal velja nevnd, og harafturat skal ein taka støðu út frá, hvussu leingi ein nevnd skal sita, sigur Johan Dahl.